# Hvat skal eg?

Í hesum døgum verða lívsleiðir lagdar. Lívsætlanir stungnar út í kortið. Og lívsáskoðanir umhugsaðar. Hvat vil eg við mínum lívi? Freistin fyri valinum, hvat lívið skal nýtast til, nærkast í hvørjum. Spurningarnir eru helst nógvir, og møguleikarnir eru enn fleiri. Skal man fylgja streyminum, fáa eina íbúð á Oyrasundskollegienum og útbúgva seg í tryggleikanum millum føroyingar á Amager? Ella skal man fylgja dreyminum og fara til fjarskotin lond, har alt er øðrvísi enn her heima?

Og hvussu so, um børnini eru komin? Kann man veruliga loyva sær at uppala børn millum múrsteinarnar í Keypmannahavn – ella enn longri burturi frá familju og tryggleikanum í Føroyum? Er tá ikki best at vera verandi her heima? Og hvørjir útbugvingarmøguleikar eru í Føroyum?

Alt fleiri føroyingar leita sær út í heim til útbúgving. Nógv teir flestu fara framvegis til Danmarkar, men talið av teimum, sum hætta sær longri, økist í hvørjum. Summi sameina báðar møguleikarnar; lesa í Føroyum ella Danmark, men fara so út í heim sum skiftisnæmingar í eitt lestrarskeið ella tvey. Og børnini kunnu saktans sameinast við lesturin, heldur eitt par, sum hevur fingið trý børn, meðan tey hava lisið í Keypmannahavn. Stuðulsmøguleikarnir eru av teim allar bestu, so tað er bara at taka av.

Men eisini her heima eru nógvar útbúgvingar, sum halda altjóða støði. Bæði akademiskar- , vinnuligar- og yrkisútbúgvingar.

Vónandi kann hetta lestrarblaðið vísa á møguleikar heldur enn forðingar, óansæð hvussu tín lívsætlan sær út.



við lestrarkvøðu,
*Eydna Skaale*

# Hentar heimasíður:

*Lagt til rættis:*
*Eydna Skaale*
*eydnaskaale@hotmail.com*

**Ráðgevingin í Keypmannahavn:**

Svar til allar spurningar:
Tá tú skalt flyta uttanlands at lesa, eru nógv ting, ið skulu fáast uppá pláss. Í Danmark er ein føroysk ráðgeving, har tú á føroyskum kanst spyrja um lívið, sum føroyingur í Danmark. Randi Johannesen og Ruth Dal-Christensen eru báðar føroyskar og hava starvast í ráðgevingini í meiri enn 25 ár. Tær hava uppbygt eina servitan, og um tær ikki vita svarið, so finna tær skjótt útav tí fyri teg.
Tær duga at svara um sjálva flytingina, um SU, um at finna bústað, um at flyta við børnum, um føroyafrádráttin o.s.fr.
Á heimasíðuni *www.radgevingin.dk* fært tú svar uppá teir oftast settu spurningarnar í sambandi við at flyta niður.

**Stuðul til lesandi**

Í Føroyum hava vit nakrar av heimsins bestu stuðulsskipanum, serliga um tú hevur hug at fara út í heim at útbúgva teg.
– ÚS stuðulin er eitt mánaðarligt gjald til teirra, ið lesa her heima.
– ÚSUN stuðulin er eitt gjald til teirra, sum fara út um Norðurlond at lesa, og sum hava tørv á peningi til skúlagjaldið. ÚSUN



stuðulin er júst minkaður úr 100.000 niður í 80.000 kr, men framvegis ber til at læna 80.000 kr afturat teimum 80.000, sum verða lætnar.
– Ferðastuðulin verður latin teimum, ið lesa uttanlands. Ferðastuðulin er ein upphædd, sum verður latin lesandi og børnum teirra, so tey sleppa heim til Føroya einaferð árliga at ferðast.
– Verkætlanarstuðul er ein fíggjarlig hjálp til teirra, sum skulu uttanlands í praktikk, heim til Føroya at skriva spesialið ella aðrastaðni í samband við útbúgvingina. Hjálpin er til ferðaseðlar aftur og fram.
– Tá danska SU-styrelsen ikki vil rinda SU í meiri enn 4 ár, kann Stuðulsstovnurin taka yvir og rinda eitt SU-líknandi gjald at liva fyri seinastu árini. Fólk, sum lesa í ávísum londum fáa bert fáa SU-stuðul í 4 ár. Men tá kann Stuðulsstovnurin rinda í tvey ár afturat, soleiðis, at stuðul verður veittur í 6 ár tilsamans.
– Stuðul til málskúla um tú skalt lesa í einum landi, har málið hvørki er norðurlendskt ella enskt. Treytin er, at skeiðið gevur málsligan førleika til hægri lærustovn.
Á *www.studul.fo* kanst tú lesa meiri um stuðulsmøguleikar hjá føroyskum lesandi

**Altjóða Skrivstovan - lestrarvegleiðing fyri føroyingar**

Á skrivstovuni hjá ASK eru tvey fólk í starvi. Tey starvast við at hjálpa og ráðgeva føroyingum, sum ætla sær undir lestur -ella fólki, sum longu eru farin undir útbúgving.
Har frættir tú alt um lestur í útlondunum, upptøkukrøv, umsóknarfreistir, umrokning av próvtalsstigum, stuðulsskipanir, ja, alt, sum tú kundi hugsast at ivast í. Ein leinkja eitur "ofta settir spurningar", og har finnast helst svar uppá fleiri av teimum spurningunum, sum tú gongur við. Eisini ber til at skriva til starvsfólkið, um tú ikki finnur svar á heimasíðuni.
*www.ask.fo*

**Uddannelsesguiden – um tú ivast**

Tað er torført at velja seg inn á eina ávísa útbúgving, tí møguleikarnir eru jú ótalligir. Men á hesi heimasíðuni hjá danska útbúgvingarráðnum kanst tú peila teg inn á, hvørjar útbúgvingar kundu verið nakað fyri teg.
*www.udannelsesguiden.dk*

**Boligportal - tá tú skalt finna ein bústað í DK**

Ein av stóru trupulleikunum, tá tú skalt burtur at lesa, er at finna okkurt at búgva í. Framvegis fara flestu føroyingar til Keypmannahavnar at lesa, og framvegis man Oyrasund vera staðið, ið hýsir flest føroyingum í Danmark. men til ber at leita ymsa staðni, og jú breiðari tú leitar, jú størri gerst møguleikin at fáa okkurt til tíðina.
*boligportal.dk*

**Universitet í Stóra Bretlandi**

The Times hava gjørt eina meting av, hvussu góð fróðskaparsetrini í Onglandi eru. Allir stovnarnir eru mettir út frá somu spurningum, m.a. hvussu nøgdir næmingarnir eru, hvussu góðir hentleikarnir eru og hvussu nógv verða liðug við tað, tey byrja uppá.
Kanningin sæst á síðuni
*http://extras.timesonline.co.uk/tol_gug/gooduniversityguide.php*

**Norska leitisíðan til lestraráhugað**

Um tú ivast í hvat tú skalt fara undir at lesa, ella um tú ynskir at lesa um lestrarmøguleikar í ymsum londum, so er norska leitisíðan sera góð.
*www.ansa.no*

**Tá tú ert lesandi**

Meginfelag Føroyskra Studenta er felagið fyri øll føroysk lesandi. Deildir eru í Føroyum, Keypmannahavn, Århus og Aberdeen. Á heimasíðuni hava tey savnað eina rúgvu av tilfari, bæði kunnandi og undirhaldandi. Har eru eisini leinkjur til aðrar og viðkomandi heimasíður.
*www.mfs.fo*

**Landsfelag føroyinga undir útbúgving – lestrarvegleiðing**

Hjá LFÚ starvast lestrarvegleiðarar, sum eisini starvast á miðnámsskúlunum. Tey vita alt um at søkja eftir kvotu 1 og kvotu 2, upptøkukvotientir, freistir og alt annað, sum hevur við lesnað at gera. Á heimasíðuni eru nógvir hentir upplýsingar. Til ber eisini at gerast limur í LFÚ og fáa ymsar fyrimunir.
*www.lfu.fo*




**Redaktørur:** Eydna Skaale
**Blaðfólk:** Rigmor Dam, Dagfinn Olsen, Heini í Skorini, Rólant Waag Dam, Eydna Skaale
**Tekningar:** Óli P
**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Forsíða:** Jón Tórður Einarsson
**Lýsingar:** Høgni Thomsen, Finnbjørg Nattestad
**Umbróting:** Sp/f Sosialurin
**Útgevari: Sp/f** Sosialurin
**Prent:** Prentmiðstøðin